# ítróttur

Nr. 82 • mikudagur • 2. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Vinnarin er funnin



*Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum, tekur her hepna vinnaran úr posanum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Stórur áhugi hevur verið fyri kappingini um eina ferð til dystin millum FCK og Brøndby tann 12. mai. Fleiri túsund seðlar eru sendir Sosialinum, og vinnarin var Joan Jacobsen úr Havn**

KAPPING
*Stefan í Skorini*

Tann 12. mai í ár bresta tey bæði donsku stórliðini FC København og Brøndby saman í einum sera spennandi dysti, sum væntandi fer at avgera, hvar danska meistaraheitið endar. Liðini eru sera jøvn í løtuni, og vónandi er framvegis tætt millum liðini, tá dysturin skal spælast.

Áhugin í Føroyum er sjálvsagt stórur, tí Todi Jónsson helst verður á vøllinum í Parkini henda dagin.

Fleiri enn 40.000 atgongumerkini eru seld til dystin, og tað verður tí eitt fullsett stadion, tá leikararnir í hvítum og gulum troyggjum renna inn á vøllin.

### Stórur áhugi

Áhugin fyri kappingini hjá Sosialinum hevur verið ovurhonds stórur. Fleiri enn túsund brævbjálvar eru sendir blaðnum.

Hepni vinnarin var Joan Jacobsen úr Havn. Hon hevði gitt rætt og víst á, hvar bólturin var. Hon hevur tí vunnið eina ferð til Keypmannahavn við Atlantic Airways at hyggja eftir spennandi dystinum saman við nógvum øðrum føroyingum, og hýrurin verður óivað góður.

## Hálv-marathon í Havn

RENNING
*Stefan í Skorini*

Komandi leygardag tann 4. mai klokkan 13 skipar Bragdið fyri FM í hálv-marathon í Havn. Av misgáum kom at standa í blaðnum í gjár, at talan var um heilt marathon, men hetta skal rættast til hálv-marathon.

Byrjað verður á leiðini við Bursatanga, og runnið verður eftir slættari leið niðri við kajøkið og úti við Strond.

Bragdið boðar frá, at øll eru vælkomin ung sum gomul. Aldursmarkið er tó 16 ár.

Tey, ið hava hug at royna seg í hálv-marathon, kunnu boða frá luttøku á kajøkinum hálvan tíma áðrenn startskotið.

# Ragnar og Guri fóru við gullinum



*Gurið Poulsen, høgrumegin, úr HBF vann á Ingun Hansen úr Stráluni í finaluni í einmansleiki hjá kvinnum*



*Ragnar Rasmussen, høgrumegin, vann á Heðini Joensen í finaluni í einmansleiki. Teir eru báðir úr HBF*

**FM í badminton hevur verið um vikuskiftið. Gurið Poulsen og Ragnar Rasmussen úr HBF fóru við gullinum í einmansleiki**

**Vinnararnir vóru:**
Í einmansleiki fyri kvinnur:
nr. 1 Guri Poulsen HBF
nr. 2 Ingun Hansen Strálan

**Í tvímansleiki fyri kvinnur:**
nr. 1 Guri Poulsen/Elsa Thorkildshøj HBF
nr. 2 Bjørg Djurhuus/-Marit Mortensen HBF

**Í einmansleiki fyri menn:**
nr. 1 Ragnar Rasmussen HBF
nr. 2 Heðin Joensen HBF

**Í tvímansleiki fyri menn:**
nr. 1 Ragnar Ramusssen/Rani í Líð HBF
nr. 2 Heðin Joensen/-Gunnar M. Gregoriussen HBF

**Blandaður tvímansleikur:**
nr. 1 Guri Poulsen/Rani í Líð HBF
nr. 2 Bjørg Djurhuus/-Gunnar M. Gregoriussen HBF



*Í tvímansleiki hjá kvinnum vunnu Guri Poulsen og Elsa Thorkildshøj á Bjørg Djurhuus og Marit Mortensen*



*Í tvímansleiki vunnu Ragnar Rasmussen og Rani í Líð úr HBF á Heðini Joensen og Gunnari M. Gregoriussen úr HBF*




## Skrivstovufólk

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum fer í barsilsorlov, verður søkt eftir avloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum frá 1. juni og árið út.

Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði í samband við uppboðssøluna. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

## Summarferiuavloysari

Eisini sóknast vit eftir feriuavloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum.
Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

Hevur tú hug at vita meira um størvini, ert tú vælkomin at ringja á telefon 414141.

Umsókn skal sendast til

**P/F Fiskamarknaður Føroya**
**650 Toftir**

og má vera okkum í hendi innan 10. mai 2002.

GÖLZ SKERIMASKINUR



**Verða nýttar til:**
**· asfalt og betong**
***Vit bjóða skeriklingur til allar maskinur!***
Kaj Andreasen & Co
Sosialurin - 311820

http://www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Bakaralærlingur

**Okkum tørvar ein raskan bakaralærling.**

**Hevur hetta áhuga so ring ella skriva til:**

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 311060**

frants restorff

mbf

## Ársaðalfundur

Sum fyrr fráboðað verður aðalfundurin hjá MBF leygardagin 4. mai 2002 kl. 14.00 í Pálsstovu.

Skrá smb. viðtøkum felagsins.

Kl. 14.00 hevur Petra Johnsdóttir Joensen, almannastjóri, fyrilestur, ið nevnist »Bygnaðarbroytingar á Almannastovuni – betri tænastustøði«.

Allir limir kunnu møta.

**Starvsnevndin**

Skeið

## Samtalan sum leiðsluamboð

**Tær truplu samtalur - Leiðarin sum leiðbeinari**

Endamálið við skeiðinum er at styrkja um førleikan hjá luttakarunum at brúka samtaluna sum professionelt amboð í ymiskum truplum støðum. Talan kann t.d. vera um, at okkurt avrik er ov vánaligt arbeðsliga, at siga nei til umsóknir um starv, nógvir sjúkradagar, alkoholtrupulleikar, uppsagnir o.a.

Á skeiðinum verður arbeitt við framløgum, samtalum og praktiskum venjingum, ið innihalda videoupptøkur.

Skeiðið vendir sær til stjórar og leiðarar við starvsfólkaábyrgd.

Skeiðsleiðarar eru vinnulívssálarfrøðingarnir Nikolaj Lunøe og Jan Willemoes.

Skeiðið er á føroyskum og á donskum.

Skeiðið verður hildið 19.-21. juni á Hotel Vágum sum internatskeið.

Skeiðið er evna til 12 luttakarar.

Skeiðsleiðslan skilar sær rætt til sjálv at seta skeiðsluttakarbólkin saman,

Kostnaður fyri skeiðið er 7.500,00 kr. við øllum

Tilmelding fram til mánadagin 27. mai á telduposti: wille@post.olivant.fo
Svar verða send luttakarunum í viku 23 saman við endaligu skránni, profilum og luttakaralista.
Ynskja tygum at vita meira um skeiðið ringið til Jan Willemoes á tlf.: 21 15 09

WILLEMOES PROCONSULT

## Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi 35/40 tímar um vikuna frá 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu. Starvið er fyribils í eitt ár, møguliga fast eftir hetta.
Søkir ongin pedagogur verður hjálparfólk sett.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3–7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, tlf. 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 24/5-2002.

Barnagarðurin á Konmansmýru

## Útbjóðing

**Nýggj kommunuskrivstova í Sumba**

Fyri Sumbiar kommunu, verður arbeiðið at umvæla og umbyggja verandi bygning til nýggja kommunuskrivstovu, hervið boðið út alment í **høvuðsarbeiðstøku**:

1. Jørð-, kloakk- og betongarbeiði
2. Timburarbeiði
3. Múraraarbeiði
4. Málaraarbeiði
5. HVS-arbeiði
6. El-arbeiði

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðnum juni til september.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsbyggifelagið í seinasta lagi týsdagin 7. mai.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Nýggj kommunuskrivstova í Sumba« skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. juni 2002 kl. 15.00.

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 3. juni kl. 15.00.

**Landsbyggifelagið P/F**
Postboks 228
Grønlandsvegur 5
FO-110 Tórshavn